TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**torshavn.fo/hoyringar**

# Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, Hoyvík

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 14. desember 2023 uppskot um at gera serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 139a, Hoyvík.

Uppskotið snýr seg um eina nýggja vinnuútstykking á Ovara Hjalla við umleið 29 vinnustykkjum í ymiskum støddum.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá fríggjadegnum 5. januar 2024 til 16. februar 2024.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 16. februar 2024.




